# El-Teknik søkir eftir fólki

Søkt verður eftir fólki at byrja skjótast gjørligt.

**Krøv:**
Elektrikkari ella tilsvarandi útbúgving.
Ert fyrikomandi og ágrýtin
Góð samstarvsevnir

**Vit arbeiða við:**
Virkisinstallatiónum
PLC-stýringum
Yvirvakin við PLC og SCADA

**El-Teknik kann bjóða tær**
Stóra avbjóðing í arbeiðinum
Fjølbroytt arbeiði
Samstarv við nógvar ymiskar kundar

Hevur hetta tín áhuga, ring so til Jákup Tróndheim 594419.

**El-Teknik Sp/f**
Tlf. +298 44 33 13 · Fax nr. +298 44 33 14
E-mail: elteknik@elteknik.fo
FO-520 Leirvík
Føroyar

**Klaksvíkar Sjúkrahús**
700 Klaksvík

# Læknaskrivari

Á skúkrahúsinum er fast starv sum læknaskrivari fulla tíð leyst at søkja til setan 1. juni 2006. Møguleiki kann vera at arbeiða niðursetta tíð.

**Førleikakrøv:**
- útbúgving sum læknaskrivari
- dugir at raðfesta arbeiði, sum til tíðir er krevjandi
- góð samstarvsevni
- góður røkjuskapur
- teldukunnleiki.

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið.

Skrivligar umsóknir við avriti av prógvum og viðmælum skulu sendast til:

**Klaksvíkar Sjúkrahús**
Umsjónarmaðurin
FO-700 Klaksvík

Umsóknarfreist 27. apríl 2006.

## Avloysari fyri maskinmann

FAROE SEAFOOD

Søkt verður eftir einum fólki sum avloysara fyri maskinmann, at byrja sum skjótast.
Arbeiðstíðin er í samband við dagliga framleiðslu.
Arbeiði umfatar dagligt viðlíkahald av maskinum

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Klæmint á telefon 594020

**P/F Faroe Seafood, Vestara Bryggja**
**Postboks 218 · FO-110 Tórshavn · Tlf. 355555 - Telefax 312631**

## Minningargrunnur Johannu og Conrad Skaale

Við hesum verður boðað frá, at Minningargrunnur Johannu og Conrad Skaale býtir stuðul út á øðrum sinni.

Endamál grunsins eru:

- at veita stuðul til útbúgving til eftirkomarar eftir systkjunum hjá Johannu og Conrad Skaale,
- at veita stuðul til útbúgving hjá foreldraleysum børnum uttanfyri slektina, um so er, at ikki nóg mikið av umsóknum eru frá eftirkomarunum.
- at veita stuðul til børn, ið eru foreldraleys ella sum hava mist annað av foreldrunum, og sum eru treingjandi á ein hvønn hátt.

Onnur enn eftirkomarar eftir systkjum stovnaranna kunnu sostatt eisini søkja um stuðul.

Umsóknir um stuðul úr grunninum skulu vera inni í seinasta lagi 1. mai 2006, og umsøkjararanir kunnu rokna við at fáa svar innan august mánaður er farin.

Umsóknir um stuðul skulu hava neyðugar upplýsingar og prógv um útbúgving higartil, ætlaða útbúgving og mettar útreiðslur í hesum sambandi.

Umsøkjarar ið eru skyldir við stovnararnar sum ásett omanfyri, skulu senda váttanir um skyldskapin saman við umsóknini.

Roknað kann verða við stuðulsupphæddum frá kr. 25.000,00 til kr. 50.000,00 til støddar.

Umsóknirnar skulu sendast til:

**Minningargrunnur Johannu og Conrad Skaale**
c/o Halgir Winther Poulsen, adv.
Fr. Petersensgøta 9
Postboks 6
100 Tórshavn

FØROYA FELAG MÓTI KRABBAMEINI

Aðalfundurin hjá
Føroya Felag Móti Krabbameini
verður í Listaskálanum
mikukvøldið 19. apríl kl. 19.00

**Kl. 20.00 verður almennur fyrilestur um Lívsdygd í eini familju í samband við lívshóttandi sjúku v/ Ingu Poulsen Dam, presti**

**Øll eru vælkomin**

FØROYA FELAG MÓTI KRABBAMEINI

# Arbeiðsfólk

Søkt verður eftir arbeiðsfólki til timburdeild okkar at byrja skjótast tilber.

Vinarliga sendið okkum eina umsókn, ella støkkið inn á gólvið.

**Sp/f Lützen's Timburhandil**
Skálatrøð 16 · Postboks 129 · 110 Tórshavn
Tlf. 31 10 20 · mail: lutzen@post.olivant.fo

**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Heilsurøktari/ pleygari

Á psyk. D3 er eitt farloyvisstarv sum heilsurøktari/pleygari leyst at søkja til setan frá 1. mai 2006 til og við 30. apríl 2007 á starvsbrøki 0,8 í skiftandi vaktum.

D3 er ein opin psykiatrisk viðgerðardeild, ið er í støðugari menning. Har starvast sjúkrarøktarfrøðingar, pleygarar og heilsurøktarar í tøttum samstarvi við aðrar fakbólkar.

**Krøv til umsøkjaran:**
- góðkenning sum heilsurøktari/pleygari
- royndir og áhuga innan psykiatri
- góð samstarvsevni

**Vit kunnu bjóða:**
- eitt dynamiskt, fjølbroytt og vinarligt arbeiðsumhvørvi
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- positivt tvørfakligt samstarv
- góða innleiðslu

**Løn og setanartreytir** smb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

**Nærri fæst at vita** um størvini við at ringja til Elsebeth Sørensen, deildarleiðara, telefon 30 45 00, lokal 4003 ella Bergit Weihe, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 4102, e-post: bergitw@lsh.fo

**Umsóknarfreistin** er 26. apríl 2006 kl. 12.00

**Skrivligar umsóknir** við avriti av prógvum og viðmælum e.l. skulu sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Lønar- og starvsfólkadeildin
FO 100 Tórshavn



## Leyst starv

**Arbeiðsfólk til lendisdeildina**

Søkt verður eftir fólki til urtagarðsarbeiði. Hetta umfatar lúking, grassláttur, planting, moldarbeiði og annað.

Umsóknarfreist: Hósdagin 27. apríl 2006.

Setanarviðurskifti: Starvið verður sett sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

Meira fæst at vita við at venda sær til Jógvan Olsen, røktarleiðara, tlf. 30 20 10 ella fartlf. 27 36 80.

**Les meira um starvið á www.torshavn.fo/leysstorv**
www.torshavn.fo er at síggja á Býarbókasavninum, í Snarskivuni og í Kunningarstovuni

**Tórshavnar kommuna**